tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turid Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Hann ið tegir hann samtykkir

Oddagrein

Mikið rok hevur staðist av, at konservativi flokkurin í Eysturíki hevur gjørt av at taka víðgongda høgraflokkin hjá Jörg Haider við í nýggju stjórnina, sum verður skipað eftir valið, har nær um triðingurin av eysturrísku veljarunum valdu víðgongda høgraflokkin.

ES-londini hava gjørt vart við sína ónøgd við, at ein so víðgongdur og fremmandahatskur høgraflokkur skal koma til valdið í Eysturríki, og tey hótta við tiltøkum. Kortini eru nógvar røddir frammi, sum siga, at tað er eysturríska fólkið, ið ger av, hvør skal stýra landinum. Og rætt hava tey í tí — men bara til eitt vist.

Fara vit 67 ár aftur í tíðina, so hendi tað sama í Týsklandi. Ein víðgongdur høgrapolitikkari vann fram við sínum flokki, ið hevði somu sjónarmið, sum flokkurin hjá Jörg Haider: Adolf Hitler og naziflokkur hansara. Eins og í Eysturríki í dag kom hann til valdið saman við konservativa flokkinum - eftir eitt demokratiskt val.

Hitler fekk makt sum hann hevði akt - og restina av søguni kenna vit.

Nú vilja kanska fleiri okkara siga, at hetta er so langt síðani, at hetta fer ikki at endurtaka seg. Men søgan endurtekur seg. Vit mugu endiliga ikki halda, at demokratiið í Evropa er komið yvir allar barnasjúkurnar.

Vit hava øll verið vitni til meiningsleysa stríðið á Balkan, har medborgarar okkara - hóast demokratiskt óbúnari - hava dripið frá hond, meðan »framkomnu demokratisku« grannalondini stillisliga hava hugt - og fleiri teirra birt undir eldin við at selja vápn.

Annars kunnu vit bara nevna Norðurírland, gamla Sovjettsamveldið og Ísrael sum dømi um lond, har dráp og fremmandahatur er gerandiskostur.

Hugsjónarfelagi Haiders, Pinochet, ið hevur fleiri túsund mannalagnur á samvitskuni, hevur verið afturhildin í Onglandi seinasta árið. Men stjórnin hjá Tony Blair hevur nú prógvað, at hugsjónin ikki er so sterk, sum vit høvdu hildið og vónað. Bretsku sosialistarnir hava hesa vikuna prógvað, at politikkur og hugsjónir ikki sampakka.

Í staðin fyri at lata hópdrápsmannin fyri ein dómstól, senda teir hann heimaftur til Chile, so hann kann liva restina av ævi síni í tign, heldur enn at lata rættvísi tala.

Pengar og vald sampakka. Pengar lukta ikki. Men hann, ið tegir, hann samtykkir…

Sosialurin

Lesarabrævur:

Áheitan

Gjørdist ikki sørt skelkaður, tá eg las í Sosialinum 22. januar, har greitt var frá, at okkara klóku høvd rýma av landinum.

Vil tí her koma við einari inniligari áheitan til rætta viðkomandi um at geva Magna Laksafoss ta løn, hann sigur seg vera verdan, so at hann ikki noyðist til Grønlands at arbeiða.

Tað er bæði synd og skomm at lata ein ungan serfrøðing við hansara vitan gleppa okkum soleiðis av hondum.

Vinarliga
John Berg

Framgongd í P/F Trygd

Trygd hevur í 1999 í mun til árið fyri tvífaldað tryggingarinntøkuna úr 5,0 mió. kr. til 10,3 mió. kr.

Havandi í huga, at felagið tók virksemið uppaftur so seint sum í februar 1998 og í tí fyrsta árinum bara teknaði sethúsa- og familjutryggingar, heldur nevndin gongdina vera nøktandi. Í 1999 hevur Trygd sum kunnugt víðkað um tænasturnar, soleiðis at felagið nú eisini teknar biltryggingar, ferðatryggingar og vinnulívstryggingar.

Virkisgrundarlagið er enn ikki nóg mikið fyri at rinda teir kostnaðir, ið bundnir eru at rakstrinum hjá felagnum. Trygd hevði 3,7 mió. kr. í tryggingartekniskum halli á vanliga rakstrinum í 1999 móti 5,6 mió kr. árið fyri.

Tað samlaða úrslitið fyri 1999, áðrenn eykainntøkur og -útreiðslur og skattur eru roknað, er 1,9 mió. kr. í halli í mun til 5,0 mió. kr. í hallí í 1998. Eykainntøkurnar eru 0,4 mió. kr. (netto). Í upphæddini eru 1,1 mió. kr. í vinningi í sambandi við sølluna av ognini Bryggjubakki 22.

Trygd hevur sum avleiðing av samanleggingini við VB Holding, sum hevði munandi óskattaðar burturleggingar í íløgugrunninum, kunnað nýtt eitt hall framflutt síðani 1995. Í sambandi við samanleggingina hevur Trygd á henda hátt minkað tann útsetta skattin, ið hvílir á felagnum, við 1,9 mió. kr.

Úrslitið hjá Trygd gjørdist eftir hetta 0,5 mió. kr. í nattoavlopi í 1999, móti einum halli á 6,9 mió. kr. í 1998.

Við ársenda 1999 er eginognin 53 mió. kr.

Roknskapurin verður lagdur fyri ársaðalfundin hjá Trygd til góðkenningar, ið er innkallaður at verða tann 9. februar 2000.

Aðalfundurin verður annars tann seinasti av sínum slag. Høvuðspartaeigarin í Trygd, P/f Føroya Banki, sum eigur meiri enn 96 pst. av partapeninginum, hevur gjørt av at innloysa minnilutapartaeigararnar eftir reglunum um hetta í partafelagslógini. Innloysingin verður 31. mars 2000, sigur Trygd í tíðindaskrivi.

Hugskotskapping fyri snildar hendur

Flestu fólk putlast í frítíðini heima við alskins uppgávur. Fæst ikki rætta loysnin til keyps, er oftani ikki mark fyri hugflogi, tá hugt verður eftir, hvussu hesa ruppgávur verða loystar - stórar sum smáar. Útyvir gleðina at skapa nakað sjálvur, er nú eisini møguleiki fyri at verða við í hugskotskapping við tílíkum snildum loysnum. Byggekram-handilsketan útlovar eitt gávukort áljóðandi 25.000,- kr. til besta hugskotið.

Kappingin er háttað soleiðis, at luttakararnir skulu greiða frá sínum hugskoti, annaðhvørt við einari teknin ella bert við at skriva eina frágreiðing á pappír. Eitt krav er tó sjálvsagt, at hugskotið er so væl frágreitt, at tað er skilligt fyri lesaran og er møgulgit at útføra. Hugskotið kann avleverast í øllum Byggekram-handlum í Danmakr og hjá P/f Havnar Tim-burhandli í Føroyum. Møguleiki er eisini at senda hugskotið til heimasíðuna hjá Byggekram á internetinum. Kappingarreglurnar kunnu síggjas tí somu handlum og á www.byggekram.dk.

Bestu hugskotini verða loypandi løgd inn á heimasíðuna, har øll áhugaði kunnu fylgja við og njóta tey mongu hugvekjandi dømini.

»Byggekram hevði eina tilsvarandi kapping fyri trimum árum síðani, og undirtøkan var sera stór«, sigur Jógvan Jørgensen úr Havnar Timburhandli. »Fleiri hundrað sera góð hugskot komu inn, og hesin streymur helt áfram til langt eftir, at kappingin var lóug. Tey bestu av hesum hugskotum eru partur av teimum yvir 100 góðu ráðum og

vegleiðingum til hús og urtagarð, sum heimasíðan inniheldur. Kappingin tá varð ikki hildin í Føroyum, tí eingin føroysk fyritøka var limur í Byggekram. Í november 1998 gjørdist Havnar Timburhandil limur, og vit ætla tí at royna hugflogið hjá føroyingum«.

Vinnarin síðstu ferð varð upphavsmaðurin til hugskotið um »Villa Skraldely« - ein lítil skúrur bygdur til ruskíløt sum samstundis pyntar í umhvørvinum.

Fyri uttan fyrsta vinningin áljóðandi 25.000,- kr. eru 12 aðrir vinningar, sum eru 12 Black % Decker battarí borimaskinur, ið hvør er verd umleið 1400,- kr. Síðsta innlatingarfreist av hugskotum er leygardagin 5. februar 2000.

Yvirskriftin kundi misskiljast

Blaðið skal gera vart við, at tað ikki vóru orðini hjá Magnusi Magnussen, tekniska leiðara á SL, sum vóru í yvirskriftini á forsíðuni í blaðnum í gjár, men orðini hjá Henriki Old, tingmanni. Magnus Magnussen eigur koritni orðini í greinini inni í blaðnum

blaðstjórin

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaða mamma, omma og vermóðir

BORGHILD KRISTIANSEN

doyði og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum. Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á dagstovninum á Lágargarði.

Tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til og fylgdu henni til hennar seinasta hvíldarstað.

Elin, Jón, Belinda og Rebecca

Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vístu okkum samkenslu og hjálptu til, tá ið góða mamma okkara

OKTAVIA HOLM
Tórshavn

doyði og varð jarðað, takka vit hjartaliga.

Hanna og Inger

Uppritið verður almannakunngjørt

Landsstýrið er sinnað at almannakunngera uppritið til samráðingarnar við donsku stjórnini, so skjótt uttanlandsnevndin vil

JOHN JOHANNESSEN

– Landsstýrið sær ongan trupulleika í at almannakunngera upprtið. Vit eru samd um, at so opinleikin í málinum um ríkisrættarligu støðuna skal vera so stórur, sum møguligt.

Hetta sigur Høgni Hoydal, eftir mongu atfinningarnar á tingfundinum fyrradagin um, at uppritið til uttanlandsnevndina viðvíkjandi samráðingunum við donsku stjórnina um ríkisrættarligu støðu Føroya er stemplað í trúnaði.

Landsstýrið hevur fyrr vístá, at tað er umráðandi, at upprtitið verður viðgjørt í trúnaði. Grundgevingin fyri hesum var, at vit skjótt skulu til samráðingar, og tí er týdningarmikið, at danska stjórnin ikki fær frænir av útspæli føroyinga í úrtíð.

Men nú er vent í holuni. Uppritið verður almannakunngjørt so skjótt formaðurin í uttanlandsnevndi, Hergeir Nielsen, hevur givið grønt ljós fyri hesum.

Uttanlandsnevndin hevði sín fyrsta veruliga fund um uppritið í gjár. Sum Sosialurin skilir, varð á hesum fundi gjørt av at ganga mongu áheitanunum frá tinglimum á møti og lata øllum 32 tingmonnunum uppritið. Tó er enn ikki heilt greitt, um uppritið í fyrstu atløgu verður latið tinglimunum í trúnaði, ella tað verður almannakunngjørt beinan vegin.

Tó er heilt greitt, at almenningurin um stutta tíð fær at síggja innihaldið í nógv umtalaða loyniliga uppritinum. Høgni Hoydal sigur, at landsstýrið bert bíðar eftir, nær formaður uttanlandsnevdarinnar heldur tíðina vera búna til hetta.

Spurningurin í hesum sambandi er, um okkara samráðingarstøða ikki viknar, tá uppritið verður almannakunngjørt og danska stjórnin sostætt eisini fær fatur á tí. Men tað heldur Høgni Hoydal ikki.

– Sjálvur samráðingartaktikkurin verður sjálvsagt ikki almannakunngjørdur, sigur Høgni Hoydal og leggur afturat, at landsstýrið kortini fer at vera so opið, sum møguligt fyri føroya fólki í málinum um ríkisrættarligu støðuna.

Um ikki so langa tíð verður tað ikki bert uttanlandsnevndin, men eisini vanligi føroyingurin, ið sleppur at lesa uppritið til ríkisrættarligu samráðingarnar

Trýr enn upp á semju í uttanlandsnevndini

Útmeldingarnar frá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum um, at besta semjan um ríkisrættarligu viðurskiftini verður funnin millum andstøðuflokarnar og Fólkaflokkin, ræða ikki Høgna Hoydal

JOHN JOHANNESSEN

Høgni Hoydal, varaløgmaður og undangongumaðurin í fullveldismálinum, trýr ikki upp á aðra semju í fullveldismálinum, enn hana, ið funnin verður í uttanlandsnevndini.

– Eg lati meg ikki skaka av tí, sum ávísir limir í ávísum flokkum í løtuni rópa upp í panikki. Eg gangi út frá, at uttanlandsnevndin arbeiðir seriøst, og trúgvi eg tí uppá, at nógv umtalaða breiða semjan verður funnin í uttanlandsnevndini.

Høgni Hoydal heldur tað, sum fólk í løtuni varta upp við í fjølmiðlunum um fullveldismálið, vera óseriøst.

– Rópst verður upp um, at tað er skeivt, at málið er latið uttanlandsnevndini í trúnaði. Hetta haldi eg bert verður gjørt fyri at hava okkurt at finnast at. Tað er heilt vist, at fólk eisini høvdu rópt upp um, at tað var skeivt, um uppritið ikki var latið í trúnaði.

– Men hóast ógvulsiga tosið, trúgvi eg enn uppá, at málið fær ein góðan enda. Vit skulu minnast til, at tað hvørki verða Trúgvi F. Guttesen ella Høgni Hoydal, ið koma at avgera lagnuna hjá føroya fólki.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður

Høgni Hoydal vísir á, at tað í fyrstu atløgu verða allir tinglimirnir og síðani alt føroya fólk, ið kemur at taka endaligu niðurstøðuna í fullveldismálinum.